UTTAN ÚR HEIMI

## Lula tikin í eið

Fólk í túsundatali tustu til høvuðsstaðin Brasilia nýggjársdag, tá Luiz Inacio Lula da Silva varð tikin í eið sum brasilskur forseti.

Tann 57 ára gamli fyrrverandi jarnsmiðurin og fakfelagsformaðurin hevði skipað fyri einari sannari fólkaveitslu í sambandi við hátíðarhaldið, og hildi verður, at umleið 150.000 fólk vóru komin saman á grasfløtuni uttan fyri tinghúsið at síggja Lula verða tiknan í eið.

Lula vann forsetavalið í Brasil tann 27 oktober við 61 prosentum av atkvøðunum. Síðani er tað eydnast honum at fáa vinnulívið og bankaheimin at taka undir við tí ætlaða politikkinum, og bæði í Brasil og aðrastaðni verður nú bíðað eftir, hvussu forsetaskeiðið fer at vignast. Tað er greitt, at nógv er at tríva í í einum landi, har umleið 53 milliónir fólk liva undir fátækramarkinum. 170 milliónir fólk búgva í Brasil.

## Danskir muslimar skuldsettir

Ekstrablaðið avdúkaði á nýggjárinum, at danska løgreglan í loyndum hevur skeldsett tríggjar muslimar í Danmark fyri at hava latið yvirgangsfelagsskapum í Miðeystri pengar. Sambært blaðnum hava myndugleikarnir lagt hald á fleiri milliónir krónur.

Sambært blaðnum eru teir tríggir skuldsettu limir í felagsskapinum Al Aqsa, og teir hava savnað pengar, sum vórðu ætlaðir til at síggja yvirgangsatgerðir í Ísrael. Menninir eru skuldsettir eftir teirri sokallaðu yvirgangslógini og kunnu fáa upp í tíggju ára fongsul, verða teir dømdir sekir.

Danska løgreglan hevur ikki viljað gjørt stórvegis viðmerkingar til tíðindini í Eklstrablaðnum. Sakførarin Laue Trabert, sum er verji hjá einum av teimum skuldsettu, undrast eisini á, at blaðið hevur fingið fatur á tíðindunum, tí øll, sum hava við hetta málið at gera, hava tagnarskyldu, sigur hann.

## Fólk út í rúmdina

Um jóltíðir skutu kinesarar eitt ómannað rúmdarfar út í rúmdina, men nú siga kinesisku myndugleikarnir, at teir hava eisini ætlanir um at senda eitt mannað far út í rúmdina.

Altjóða serfrøðingar hava birið merki í, at kinesarar hava verið sera vorknir á rúmdarøkinum í seinastuni. Ikki færri enn fýra ómannað før hava teir skotið út seinastu mánaðarnar, og tað hevur verið tulkað sum fyrireiking til eina mannaða kinesiska rúmdarferð.

Í gjár frættist úr Beijing, at eitt mannað rúmdarfar verður skotið út í rúmdina í næstum, og altjóða serfrøðingar vænta, at tann fyrsta mannaða kinesiska rúmdarferðin verður veruleiki innan seks mánaðir.

## Funnu høvdið

Seinastu dagarnar hevur svenska løgreglan leitað eftir tí ella teimum, sum myrdu tann 22 ára gamla Marcus Noren.

Tann 22 ára gamli maðurin hvarv seinasta leygarmorgun, og mánadagin funnu tvey børn høvdið á honum úti á ísinum í einari á tætt við Halmstad. Nýggjársaftan fann løgreglan so aðrar likamspartar, sum vóru pakkaðir í plastikkposar.

Svenska løgreglan sigur, at Marcus Noren bar orð fyri at vera ein friðarligur ungur maður, og eingin skilir, hví hann varð mynrdur. Talsmaðurin hjá løgregluni í Halmstad viðgekk í gjár, at tey standa á berum í hesum óhugnaliga málinum.

# Reyði boðin í Ermasundi

**Fyri aðru ferð rendi eitt skip á norska farmaskipið "Tricolor", sum sakk í Ermasundi fyri fjúrtan døgum síðani.**

SJÓFERÐSLA
*Árni Joensen*



*Tað sokna norska farmaskipið "Tricolor" er vorðið ein vandi fyri skipaferðsluna í Ermasundi.*

"Tricolor", sum sakk í Ermasundi fyri tveimum vikum síðani, liggur á so grunnum vatni, at tað er vorðið ein vandi fyri onnur skip, sum sigla hendanvegin.

Herfyri sigldi farmaskipið "Nocola" úr teimum niðurlendsku Antillunum á vrakið, og nýggjárskvøld var aftur galið. Hesaferð var tað tangaskipið "Vicky", sum sigldi á "Tricolor". Tað 243 metrar langa og 43.000 tons stóra tangaskipið, sum er bygt í 1981 og skrásett í Turkalandi, flotnaði aftur av flóðini, men noyddist kortini at leita sær í havn at kanna skaðan.

Fronsku myndugleikarnir vita ikki, hví tangaskipið sigldi á tað norska vrakið. Ein sleipibátur hevði ávarað skiparan á tangaskipinum og biðið hann broyta kósina, men kortini sigldi skipið vrakið.

Bretsku myndugleikarnir siga, at okkurt má gerast við tað sokna norska farmaskipið. Hvørt samdøgur sigla millum 400 og 500 skip hendanvegin, og teir báðir tilburðirnir vísa, at vrakið er ein trupulleiki, siga bretsku myndugleikarnir. "Tricolor" liggur á botni í franska partinum av Ermasundi, og tað eru tí teir fronsku myndugleikarnir, sum skulu gera av, hvat skal gerast við vrakið.

Norska skipið hevði 2.682 bilar umborð, tá tá stoytti saman við eitt annað skip og sakk.

# Heath ætlaði at "reinsa" Norðurírland

**Fyrrverandi bretski forsætisráðharrin, Edward Heath, umhugsaði í 1972 at flyta markið millum Norðurírland og Írland og at noyða eina hálva millión fólk at flyta.**

NORÐURÍRLAND
*Árni Joensen*

1972 var sera ófriðarligt í Norðurírlandi. Næstan 500 fólk doyðu í samanbrestum millum protestantarnar og katolikkarnar, og nú vísa skjøl, sum hava verið loyniliga, at táverandi bretski forsætisráðharrin, Edward Heath, umhugsaði at fremja tiltøk, sum skuldu fáa enda á ófriðinum.

Eftir uppskotinum skuldu myndugleikarnir flyta eina hálva millión. Katolikkar í hópatali skuldu flytast longur suður, og síðani skuldi markið millum Norðurírland og Írland flytast, so teir norðurírsku katolikkarnir komu at búgva í Írlandi.

Tey loyniligu skjølini eru dagfest tann 23. juli í 1972, og har sæst, at Edward Heath umrøddi uppskotið saman við fimm av sínum fremstu ráðharrum í stjórnini. Uppskotið varð kortini av ongum, tí stjórnin var bangin fyri, at altjóða samfelagið fór at fordøma tað, varð tað sett í verk.

Tey loyniligu skjølini avdúka eisini, at stjórnin hjá Edward Heath hevði loyniligt samband við tann tá 23 ára gamla Sinn Fein-leiðaran Gerry Adams. Eftir skjølunum at døma var bretska stjórnin av teirri upp fatan, at Gerry Adams var sinnaður til at virka fyri friði í Norðurírlandi.

Í skjølunum sæst eisini, at Heath bað fleiri lond í bretska samveldinum hjálpa sær, tá Idi Amin gjørdi av at koyra 57.000 ugandiskar asiatar úr Uganda og at senda teir til Bretlands. Stjórnin hjá Heath bað fleiri lond taka ímóti teimum, men bert Kanada og Malawi svaraðu játtandi. Samstundis umhugsaði stjórnin at senda fólkini til Gibrelar og Falklandsoyggjarnar, stendur í skjølunum.

# Byggja heimsins størstu ferðamannaferju

**Norska ferjureiðaríið Color Line skal byggja heimsins størstu ferðamannaferju.**

FERÐAMANNASIGLING
*Árni Joensen*

Nýggja ferjan skal sigla millum Oslo og Kiel í Týsklandi. Hon verður 74.000 tons stór ella tvær ferðir so stór sum "Kronprins Harald", sum nú siglir á rutuni. Nýggja ferjan fer at taka 2.770 ferðafólk, og bilrøðin á dakkinum kann vera 3,3 kilometrar long.

Ferjan skal byggjast í Finnlandi og verður eftir ætlanini latin reiðarínum í desember í 2004. Byggikostnaðurin er 2,3 milliardir krónur. Tað er skipasmiðjan MasaYards, sum skal byggja ferjuna. Norska stórfyritøkan Kværner eigur hesa finsku skipasmiðjuna.

ítróttur

Nr. 1 • fríggjadagur • 3. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Holmstrøm er knallharður

**Skal metast eftir sáttmálatrætuni millum FCK og málverjan, Rune Pedersen, hevur Todi Jónsson lítlan møguleika at betra um fyrra sáttmálauppskotið frá FCK**

SAMRÁÐINGAR
*Jákup Mørk*



*Ítróttarstjórin í FCK, Niels Christian Holmstrøm, er sjáldan bangin fyri at siga sína meining, og í seinastuni hevur Rune Pedersen fingið av grovfíluni, tí hann hevur hug at føra sáttmálasamráðingar í fjølmiðlunum*

6. januar fer Todi Jónsson aftur til samráðingarborðið í FCK, har hann saman við ítróttarstjóra felagsins, Niels Christian Holmstrøm, skal finna út av, hvørt fótbóltsframtíð hansara er í FCK ella ikki.

Partarnir hava hitst eina ferð áður, men tað ferðina spurdist einki úrslit burturúr. Á heimasíðu sínari segði Todi eftir ta ferðina, at semja var á fleiri økjum, men ikki á tí fíggjarliga, og tí kundi hann als ikki góðtaka tað, sum FCK spældi út við.

**Harður ítróttarstjóri**
Sum nevnt, so sessast partarnir aftur fríggjadagin, og spurningurin er so, hvørt partarnir koma nærri hvørjum øðrum hesaferð. Sjálvur sigur Todi, at um hann heldur fram í Danmark, so verður tað í FCK, men spurningurin er so, hvørt ríka høvuðsstaðarfelagið er áhugað í at strekkja seg longri, enn teir hava gjørt.

Og skal metast eftir seinastu samráðingunum, sum felagið hevur verið í, so sær tað kanska eitt sindur svart út hjá Toda. Í øllum førum hevur Niels Christian Holmstrøm, ítróttarstjóri, givið málverjanum Rune Pedersen av grovfílini, nú hesin hevur sett lønarkrøv síni munandi hægri enn tað, sum FCK er til reiðar at gjalda. Og Holmstrøm er so ikki blíðkaður av, at málverjin hevur greitt BT frá sínumn sjónarmiðum.

– Vit hava givið eitt tilboð, og tá ein leikari sigur nei takk, verður hetta tikið aftur. Kemur mann so aftur seinni, tá aðrir møguleikar tykjast nyttuleysir, er tað klárt, at ein møguligur sáttmáli verður til eina lægri løn, sigur Holmstrøm við BT.

Og víðari sigur hann, at hann avgjørt ikki heldur tað vera serliga smart av málverjanum, soleiðis at fara í fjølmiðlarnar við sjónarmiðjum sínum.

– Soleiðis spælir klaverið ikki í FCK, og eg haldi, at Rune tekur eina stóra risiko við at handla soleiðis. Í FCK plaga vit vanliga ikki nýta okkum av hóttanum, men tað er klárt, at bæði leiðsla og venjari hyggja longur fram í tíðina enn hálvt ár. So um Rune ikki longur hevur hug at spæla her, so mugu vit aktivera nakrar av teimum ætlanum, sum annars hava verið liggjandi í skuffuni.

Við hesum seinasta sipar ítróttarstjórin uttan iva til, at um málverjin ikki leingir sáttmálan, skal hann ikki rokna við einum plássi í hópinum hjá FCK, tá kappingin verður uppafturtikin í vár, og so er spurningurin, um hetta samstundis er ein hóttan til aðrar, sum í løtuni eru í sáttmálasamráðingum.

# Bridgaðu um jólini

**Jólakappingin í HB-húsinum annan jóladag eydnaðist framúr væl, og eisini í Suðuroy varð spæl um jólini**

BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

2. Jóladag var opin parakapping í Bridgehúsinum í Havn. Hetta var tann sonevnda Restorffs Jólabridge-kappingin, sum ætlandi skal vera ein afturvendandi kapping á jólum. Ivasamt var frammanundan, hvussu nógv orkaðu at reisa seg upp frá teimum trivaligu jólaborðunum, men tá kappingarleiðarin, Johannes Skaarup, skeyt startskotið av til kappingina, sótu 24 leikarar um tey 6 bridgeborðini, har fleiri vóru útisetar komnir heim at halda jól.

Kappingin eydnaðist framúr væl, og eiga fyrireikararnir stórt rós uppiborið fyri tað. Leikt vóru 33 spøl, og tað var um reppið, at eitt av teimum nýggju og ungu pørunum, Eyðun Jakobsen og Jana Mikkelsen, fóru við sigrinum. Eyðun hevur spælt bridge í nøkur ár, men Jana er eitt óskrivað blað, sum nú í fleiri kappingum hevur víst framúr góð evni til hetta spælið. Á sjálvari málstrikuni eydnaðist kortini teimum ungu veteranunum Boga Simonsen og Arna Mikkelsen at taka seinasta stikkið.

Tey trý fremstu pørini (miðal er 165):

| | |
|---|---|
| Bogi Simonsen – Arne Mikkelsen | 210 |
| Eyðun Jakobsen – Jana Mikkelsen | 207 |
| Gunnar Mouritsen – Høgni Vesturklett | 195 |

Her er eitt spennandi spæl frá kappingini:

S/-
KJ10
Q32
K1084
J92

Q8763 — A9
KJ92 — A105
32 — 65
Q4 — AK10876

542
876
AQJ97
53

| S | V | N | E |
|---|---|---|---|
| Allan Dal-Christiansen | Arne Mikkelsen | Finnbjørn Olsen | Bogi Simonsen |
| 2ru | pass | 3ru | 3ut! |
| pass | pass | pass | |

### Hvat hevði tú meldað sum Eystan?

Bogi valdi 3ut, sum vanliga boðar frá haldi í litinum hjá mótpartinum. Men hann vónaði, at antin makkarin hevði eitt hald, ella at útspælarin hevði "gaffil í litinum og tí ikki fór at spæla hann út.

Og rætt var, Sunnan vildi ikki spæla út frá AQJxx í rútara og spældi í staðin hj8 út. Spælið endaði við, at Bogi fekk ikki minni enn 12 stikk og sjálvandi topp fyri spælið.

### Jólakapping í Suðuroy

Millum jól og nýggjár var kapping fyri pør í Suðuroy. Øll Suðuroyggin var umboðað, og spæld vóru 33 spøl.

### Úrslitið varð hetta:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jákup Hjaltalin - Dia Poulsen | 153 |
| 2 | Óli Holm - Páll Augustinussen | 144 |
| 3 | Johan í Smiðjuni - Andreas Djurhuus | 134 |
| 4 | Hans J. Joensen - Birgir Jacobsen | 129 |
| 5 | Áki Dimon - Knút Nygaard | 128 |
| 6 | Petur Gærdbo - Hjalmar Joensen | 123 |
| 7 | Einar Larsen - Ingi Petersen | 119 |
| 8 | Eyðun Svalbard - Andre Dalfoss | 114 |
| 9 | Petur og Jórun Winther | 99 |
| 10 | Niclas Ludvig - Sámal P. Johansen | 84 |
| 11 | Egill Steintórsson - Tove Poulsen | 82 |

### Steypakappingin

14 lið eru við í steypakappingini í ár. Stór framgongd, má sigast, tí í fjør meldaðu einans 5 lið til, og kappingin varð avlýst.

Lutakast til steypakappingina var í Bridgehúsinum eitt av seinastu spælikvøldunum fyri jól, og úrslitið av tí spennandi dráttinum gjørdist hetta (tað fyrra liðið hevur heimadyst):

### 1. umfar

(A) Jens Pauli G. Nolsøe – Carl Mikkelsen
(B) Jórun Johannesen – Eyðun Anthoniussen
(C) Finn Ougaard – Danny Transport
(D) Eyðun Jakobsen – Marner Joensen
(E) Ásla Weihe – Jóna Grunnveit
(F) Jákup Hjaltalin – Per Kallsberg

1. umfar skal leikast innan 19. januar 2003. Drigið var eisini, hvussu leikast skal í 2. umfari, sum skal vera liðugt leikt innan 21. februar 2003.

### 2. umfar

(G) Vinnari F — Vinnari E
(H) Vinnari A — Vinnari B
(I) Reimund Langgaard — Junior Buss Taxa
(J) Vinnari D — Vinnari C

Semifinalur og finala verða leiktar 8. mars 2003, har Eysturoyar Bridgefelag er vertur. Semifinalurnar skulu leikast soleiðis:

### Semifinalur

(K) Vinnari G — Vinnari H
(L) Vinnari I — Vinnari J

Í finaluni leika sjálvandi vinnari K móti vinnara L, og tað fyrra liðið er heimalið.

Vinnarin av steypakappingini skal umboða Føroyar í Rottneros í Svøríki í apríl mánaða, har allir norðurlendsku steypavinnararnir hittast. Føroysku steypavinnararnir fáa 12.000 kr í stuðli frá FBS til ferðina.